MENTAMÁLARÁÐIÐ

Ársætlan fyri lærugrein

Skúlaár	2020/2021
Skúli	Skúlin við Streymin
Floksheiti	9A./B. flokkur
Floksstig	9. flokkur
Lærugrein	Støddfrøði
Lærari	Andreas Lava Olsen í toymi saman við Jan Thomsen og Marjun Stauss

Ársætlan fyri lærugrein	Ársætlanin er, at geva næmingunum eina skipaða fatan av umheiminum og av grundleggjandi støddfrøðiligum høpi, so at teir vera førir fyri at sanna, orða og loysa støddfrøðiligar spurningar. Víðari er ætlanin at geva næmingunum vitan um støddfrøðilig hugtøk, talfatan og fimi í talviðgerð og geva teimum innlit í grundleggjandi evni og hættir í lærugreinini. Næmingarnir skulu læra at nýta handbøkur, frymlasøvn og lummaroknara. Næmingarnar verða býttir í 3 bólkar (myrkagrønt og grønt og ljósagrønt), alt eftir hvussu støddfrøðislærararnir meta næmingarnir, eru fyri. Uppbýting verður gjørd, soleiðis at frálæran kann tillagast eftir næminginum, og tí støði hann er á. Næmingarnir kunnu um lærarin metir flyta ímillum bólkarnar ígjøgnum árið. Í mínum bólki arbeiða vit við "Viku skema" sí (ugeskemarevolutionen).

Undirvísgongdir	Vit nýta í høvuðsheitum undirvísingarbøkurnar **Skygni – støddfrøði 9. + Støddfrøði Handbók** + **Fimisrokningingar.** Næmingarnir lata inn 18 avrik tilsamans (9 stk. Greiðslurokning og 9 stk. Fimisrokning (har fimisrokning verður gjørd í skúlatíð) til rættingar, ið kann ávirka støðumetanina av hvørjum einstaka næmingi.

Evnir	Tey ymisku evnini vit koma í høvuðsheitum at arbeiða við:
	Skygni 9
	• Vídd og rúmd
	• Brot og algebra
	• Geometri 1
	• Trý evni
	  ○ Prosentstig og vísitøl
	  ○ Gomul mát
	  ○ Jørðin og geometriin
	• Líkindi og hagfrøði
	• Geometri 2
	• Hagfrøði